Kappingareftirlitið

Sp/f 01.09.2025
Stangavegur 3
700 Klaksvík

Att. Jóhannis Liasson Rasmussen

Tórshavn, tann 24-11-2025

Viðv. mál nr.: 25/00512

Kappingareftirlitið fekk tann 22. oktober 2025 eina einfalda fráboðan, sbrt. § 13, stk. 2, í kappingarlógini, um at Sp/f 01.09.2025 ætlar at ogna sær 70% av partapeninginum í Sp/f KBI. Keypið er treyta av at Kappingareftirlitið góðkennir yvirtøkuna, sbrt. sølusáttmálanum.

Tá Kappingareftirlitið fær eina fráboðan um eina samanlegging, skal Kappingareftirlitið geva boð um nær fráboðanin er at meta sum fullfíggjað, sbrt. § 17, stk. 5, í kappingarlógini. Tá fráboðanin um fullfíggjað fráboðan er latin fráboðara, hevur Kappingareftirlitið 30 yrkadagar til at taka avgerð um hvørs samanleggingin skal góðkennast eftir einfaldari málsviðgerð, ella um samanleggingin skal kannast nærri, sbrt. § 18, stk. 1, í kappingarlógini. Kappingareftirlitið gav fráboðara fráboðan um fullfíggjaða fráboðan tann 23.10.2025 og skal seinast tann 04.12.2025 taka avgerð um hvørs samanleggingin skal góðkennast eftir einfaldari málsviðgerð, ella um samanleggingin skal kannast nærri, sbrt. § 18, stk. 1, í kappingarlógini.

Talan er um eina transaktión sum kemur undir samanleggingarhugtakið í §13, stk. 1, nr. 2 í kappingarlógini. Ein samanlegging eftir §13, stk. 1, nr. 2 er "*tá ið ein ella fleiri persónar, sum longu hava ræðið á minst einari fyritøku, ella tá ið ein ella fleiri fyritøkur við keypi av portum ella ognum gjøgnum avtalu ella á annan hátt fáa beinleiðis ella óbeinleiðis ræði á allari ella portum av einari ella fleiri fyritøkum afturat.*"

Samanleggingin skal fráboðast, sbrt. §14, stk. 1 í kappingarlógini, tí tær luttakandi fyritøkurnar samanlagt hava ein árligan umsetning á í minsta lagi 75 milliónir krónur í Føroyum, og minst tvær av luttakandi fyritøkunum hvør sær hava ein samlaðan árligan umsetning upp á 15 milliónir krónur í Føroyum.

Luttakandi fyritøkur hava fráboðað eftir einfaldum leisti, sbrt. § 3, stk. 1, nr. 5, í reglugerð nr. 2 frá 3. januar 2025, tí fyritøkurnar samlað hava undir 15% av marknaðinum har fyritøkurnar eru virknar og minni enn 25% av marknaðinum har onnur fyritøka er á einum fyrra ella seinna liðið til tann marknaðin, sum onnur av fyritøkunum eru virknar á.

Sp/f 01.09.2025 er eitt felag stovnað við tí endamáli, at eiga 70% av partapeninginum í Sp/f KBI. Felagið er átt av Sp/f B&E Invest, Sp/f Finna og Sp/f REX 20, sum saman eiga allan partapeningin í P/f J.F. Kjølbro Heilsøla og Sp/f Kjølur. Høvuðsvirksemi hjá P/f J. F. Kjølbro Heilsøla er heilsøla av matvørum. Harumframt hevur P/f J. F. Kjølbro Heilsøla eitt úrval av pappíri, sápum og reingerðarevnir. Sp/f Kjølur

er ein veitari til vinnuna við breiðum vøruúrvali. Høvuðsvirksemi er veiting av oljum, arbeiðsklæðir, trukkar, kranar, knívar, línur og sápur.

Sp/f KBI er ein veitari innan amboð, oljur, kemikaliur og ídnaðartilhoyr. Sp/f KBI eigur harumframt allan partapeningin í Sp/f Pólar og Sp/f Solberg. Sp/f Pólar er ein veitari av battaríum og akkumulatorar. Sp/f Solberg er ein heilsøla sum umboðar, innflytur og selur nonfood vørur til matvøruhandlar. Nonfood vørur sum Sp/f Solberg selur eru t.d. ljósperur, amboð, el-lutir, skrivstovulutir, kaffi og annað sum er at meta sum nonfood.

Yvirtøkan er skipa á tann hátt at eitt nýstovnað felag, Sp/f 01.09.2025, ognar sær 70% av Sp/f KBI fyri eini upphædd á [redacted] Við keypinum fær Sp/f 01.09.2025 einaræðið á Sp/f KBI. Eigarnir av Sp/f 01.09.2025 eru feløgini Sp/f B&E Invest, Sp/f Finna og Sp/f REX 20.

Kappingareftirlitið hevur í sínum eftirlitsarbeiðið ikki orsøk til at halda, at fráboðaða samanleggingin munandi forðar fyri virknari kapping, serliga við at skapa ella styrkja eina ráðandi marknaðarstøðu.

Kappingareftirlitið hevur tí, við heimild í § 15, stk. 7, í kappingarlógini, tikið avgerð um, at góðkenna keypi hjá Sp/f 01.09.2025 av 70% av partapeninginum í Sp/f KBI, vísandi til § 15, stk. 2, í kappingarlógini, um at ein samanlegging, sum ikki munandi forðar fyri virknari kapping, skal góðkennast.

Góðkenningin er treyta av at upplýsingarnar, sum fráboðari hevur latið Kappingareftirlitinum, eru rættar, sbrt. § 20, í kappingarlógini.

Vegna

Kappingareftirlitið

Terje Sigurðsson
Deildarstjóri

T. F. Andreasen

Teitur Friduson Andreasen
Fulltrúi